TÓRSHAVN 1909-2009
Fólkavald kommuna í 100 ár

## Móti og mentan í Müllers pakkhúsi

21. august - 6. september 2009.



# KAPPING

## Klæðir, ið skapa 'føroyingin'

Í samstarvi við Tórshavnar kommunu bjóðar Gluggaglæma øllum áhugaðum til kapping.
"100 ár á baki og visjónir um framtíðina" flutt yvir á klæðir og føroyingar - hvørjar visjónir hevur tú?

Avbjóðingin verður - "við mentanarligum samleika og visjónum um framtíðina at flyta eyðkenni við klæðum føroyinganna inn í framtíðar klæðnabúnar til føroyskar menn og kvinnur".

**Treytir:** Hvør luttakari (einstaklingur / bólkur) skal lata inn klædnasett til par, mann og kvinnu, tó í mesta lagi 3 pør. Navn, bústaður og tlf.nr. skulu vera í afturlatnum bjálva fest á hvørt parið sær. Staklutir sum taskur, húgvur, prýðislutir o.a. kunnu latast inn sum partur av klæðnasettinum. Klæðini skulu ikki hava verið at sæð/sýnd fram áður.

**Innlatingarfreist:** Avrikini skulu latast inn í Müllers pakkhús tann 7. august millum kl. 10.00- 19.00 (til Randi S. Vang ella Jónhild Johannessen)

**Døming og virðislønir:** Dómsnevnd við 3 skikkaðum dómarum metir um innkomnu avrikini. Mett verður um hepni og evnir at sameina gamalt og nýtt á ein hegnisligan og visjoneran hátt.
1. virðisløn 25.000 kr. - 2. virðisløn 15.000 kr. - 3. virðisløn 10.000 kr. Virðislønir verða handaðar á palli seinasta dagin á sølufamsýningini hjá Gluggaglæmu, har pallsýning verður við øllum innlatnum avrikum.

**Serframsýning:** Í døgunum aftan á sølufamsýningina hjá Gluggaglæmu verður Müllers pakkhús karmur um eina serframsýning, har øll innlatin avrik verða sýnd fram.

Les eisini á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu www.torshavn.fo

# GLUGGAGLÆMA

Sølufamsýning við snið & handverki í Müllers pakkhúsi 13. – 16. august 2009.

Framsýningin verður við fjølbroyttum handverksgreinum, arbeiðandi verkstaðum, pallsýningum og kafé.
Opið verður hós. - leyg. kl. 10 - 20 og sunn. 14 - 20.

(Avmarkað pláss er til tær einstøku handverksgreinirnar)

**Luttøkugjald:** 1.200 kr. pr. pers./bás-arbeiðspláss.
Íroknað er borð, stólur, ljós og hillar.

**Tilmelding** innan 20. mars 2009
hjá Randi S. Vang, t-post: ransiva@olivant.fo, tlf. 514265.

**www.gluggaglaema.fo** >Vaglið

# SØLUFÓLK

Trol- og nótavirkið Vónin, søkir eftir dugnaligum sølufólki til at røkja eitt sera spennandi og fjølbroytt arbeiðið, sum fevnir um allar tættir innan sølu av flótitrolum og kraftblokkanótum. Tað verður tín uppgáva at styrkja sambandið við viðskiftafólk okkara her heima so væl sum uttanlanda, eins og tú skapar samband við nýggjar kundar, tí er ferðing uttanlanda ein natúrligur partur av arbeiðinum.

**Førleiki**
Tann, sum settur verður, má vera kønur í norðurlendskum og enskum máli, vera vanur við telduarbeiði og eigur at vera førur fyri at leggja søluarbeiðið væl til rættis.

Tað er umráðandi at tú dugir at seta teg inn í nýggj viðurskifti og kanst loysa uppgávur sjálvstøðugt og hevur góð evni til at samskifta við viðskiftafólk og starvsfelagar.

Vit ímynda okkum, at tú hevur kunnleika til trol og kraftblokkanótir, men hetta er tó ikki nakað krav.

**Starvstreytir**
Lønarviðurskifti og setanartreytir verða sambært avtalu við leiðsluna.

**Umsókn**
Vilt tú vita meiri um starvið ert tú vælkomin at ringja til Hjalmar Petersen á telefon 21 43 92. Skrivlig umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum skal vera móttikin í seinasta lagi 13. mars 2009.

Vónin er ein av heimsins fremstu trol- og nótaframleiðarum við 9 deildum í Føroyum, Grønlandi og Kanada. Hjá Vónini starvast millum 110-120 fólk.

VÓNIN®

Bakkavegur 22 - FO-Fuglafjørður
Tel 474 200 - Fax 474 201
info@vonin.com - www.vonin.com

# Okkum vantar BILAR

Vegna øktan eftirspurning uppá brúktar bilar í prísleguni upp til Kr. 50.000,- vantar okkum bilar frá Kr. 5.000,- til 50.000,-



Vit hava góðar og lítið brúktar bilar at bjóða tykkum ístaðin.

**Úrvalið er stórt og vit bjóða góða fígging.**

**Støkk inn á gólvið og lat okkum fáa eitt bilprát.**

undir Krákugjógv 19 · Tórshavn · tel 34 54 00 · fax 34 54 03
**Auto Service**
www.autoservice.fo